Einasta blaðið 5 ferðir um vikuna

tíðindablaðið
# sosialurin
Telefon 11820 Telefax 14720

Tíðindi, lýsingar, sjónarmið, orðaskifti, myndir – bert ein partur av tí, tú finnur í blaðnum...

## veðrið

Kolið luftrak høgt rekur móti Føroyum av leiðunum millum hátrýstið yvir Íslandi og lágtrýstið yvir Noregi. Í vikuskiftinum rekur lágtrýst sunnarlag úr Danmarkarsundinum móti Føroyum og víðari til Noregs.

**Hósdagin**



Bert andøvsgul, undir 8 m/s, av ymsum ættum, mestsum ádrigið, okkurt ælið, annars toluligt ella gott sýni. Hitin um dagin uml. 5 stig, um náttina niður ímóti frostmarkinum.

**Friggjadagin**
Gul upp í stívt andøvsgul, 5–10 m/s, av útnyrðingi at byrja við, seinni av útsynningi, lutvíst ádrigið, hendinga æl, annars gott sýni og eisini sólarglottar. Hitin um dagin millum 2 og 5 stig, um náttina niður ímóti frostmarkinum.

**Leygardagin**
Millum kot og andøvsgul, 3–8 m/s, av útsynningi, ádrigið, regn og bert toluligt ella vánaligt sýni. Hitin uml. 5 stig.

**Sunnudagin & mánadagin**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind, 10–15 m/s, av útsynningi, ádrigið, okkurt ælið, men helst toluligt sýni. Hitin millum 5 og 10 stig.

## óli teknar

© 1995 Sosialurin/Óli Petersen

*New Age*




Í dag flytur Oljufyrisitingin inn á Debesartrøð










# Summi hava longu mist húsini

*Landsfelagið fyri sethúsaeigarar heitir á Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann, um at hava øll við sethúsaskuld í huganum*

Tað hevur verið frammi, at arbeitt verður við at lætta um sethúsaskuldina hjá fólki, og í tí sambandinum kemur Landsfelagið fyri sethúsaeigarar við eini áheitan til Jóannes Eidesgaard, landsstýrismann.

Felagið sigur seg vóna, at nýggja skipanin fer at gagna øllum skuldarbundum føroyingum.

Heitt verður á landsstýrismannin um eisini at hava tey í huga, sum hava mist húsini og nú standa við botnleysari skuld.

Hesi fólk hava ongan møguleika til at koma undan aftur, ei heldur hava tey møguleika til sjálvi at fáa sær ein bústað aftur, tí tann gamla skuldin hongur við restina av lívstíð teirra, sigur landsfelagið fyri sethúsaeigarar, sigur felagið, ið kundi hugsað sær at vita, hvussu hesi fólk skulu klára seg fram yvir. Sum er noyðast fleiri teirra at leiga antin á privata marknaðinum ella frá peningastovnunum, og einki eftirlit er við prísunum.

Eftir tølunum á lýsingum um tvingilssølur fara støðugt fleiri fólk at missa hús síni, og landsfelagið fyri sethúsaeigarar spyr myndugleikarnar hava nakrar ætlanir um at útvega íbúðir til at hýsa heimleysum føroyingum.

Landsfelagið fyri sethúsaeigarar boðar annars frá, at ársaðalfundur felagsins verður 27. mai kl. 15. Fundarstaðurin verður lýstur seinni.




## Vestfalskyrrindi

**14. mai: Fullmáni**
**15. mai: Mánin næstur jørðini**
**21. mai: Seinna kvarter**

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/Leirvíkafirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18 mai | 1030 | 2258 | 0000 | 1230 | 0845 | 2113 | 1045 | 2313 | 0930 | 2158 | 0945 | 2213 |
| 19 mai | 1126 | 2337 | 0058 | 1326 | 0941 | 2152 | 1141 | 2352 | 1026 | 2237 | 1041 | 2252 |